# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Varaleiðari til B7 – endurlýsing

Vit søkja eftir einum fulltíðar varaleiðara til B7 til setan 1. desember 2007 ella eftir avtalu.

B7 er ein nýumvæld medisinsk deild, sum tekur móti elektivum og akuttum vaksnum sjúklingum. Umvælingar á B6 eru í gongd, og sjúklingar og starvsfólk á B6 eru í løtuni á B7 og á E3/E2. E3 við sergreinini rehabilitering av apoplexi sjúklingum verður løgd saman við B7.

Tvørfaklig menning við undirvísing innan allar sergreinarnar er byrjað.

Aðrar spennandi avbjóðingar, ið liggja fyri framman, eru m.a. íverksetan av THS (Talgild Heilsu Skipan) primo 2008.

Deildin hevur vanliga pláss fyri 15 sjúklingum og fer at hava hesar sergreinar:

- apoplexi
- lungamedisin
- nefrologi
- rheumatologi
- onkologi
- hæmatologi

**Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum:**
- faklig menning av deildini saman við deildarleiðaranum
- virkandi leiðari, tá deildarleiðarin er burturstaddur
- ábyrgd av lesandi
- verða við í klinisku røktini

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- áhuga í leiðslu
- áhuga í fakligari menning av starvsfólkum
- hollan fakligan førleika innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð tvørfaklig samstarvsevni
- sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og hava visiónir
- teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða:**
- innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Starvslýsing og meira fæst at vita við at ringja 304500 til Jónu Augustinussen, deildarleiðara á B7, lokal 6067, lsjonau@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 12. november 2007 kl. 12.00**

## Ljósmøður

Í Ljósmøðratænastuni eru 3 avloysarastørv sum ljósmóðir leys at søkja til setan skjótast gjørligt og fram til 31. august 2008. Talan er um tvey fulltíðarstørv og eitt starv á starvsbrøki 0,8.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- starvsroyndir innan viðgongu, føðing og barsilstíð
- fleksibul og positiv/ur
- hug til tvørfakligt samstarv

Meira fæst at vita um starvið við at ringja 304500 til Eyðfrið L. Jacobsen, leiðandi ljósmóðir, lokal 5301, lseydja@ls.fo ella til Anniku Hoydal, deildarleiðara lokal 5303, lsannho@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 23. november 2007 kl. 12.00**

## Fysioterapeutur

Søkt verður eftir fysioterapeuti fulla tíð til setan 1. desember 2007 ella eftir avtalu.

Á Landssjúkrahúsinum eru ymiskar sergreinir, og er fysioterapi ein týðandi partur av viðgerð, sum er knýtt at hesum sergreinum. Á Fysioterapideildini eru 11,7 fulltíðarstørv: 1 leiðandi fysioterapeutur, 1 deildarfysioterapeutur, 12 fysioterapeutar og 1 heilsurøktari, í alt 14 fólk.

**Vit bjóða:**
- eitt arbeiðsumhvørvi við skiftandi arbeiðsuppgávum
- virknar starvsfelagar
- fakligar avbjóðingar

**Vit vænta:**
- ágrýtni
- góð samstarvsevni
- opinleika og neyvt samstarv við aðrar fakbólkar

**Krøv til umsøkjaran:**
- útbúgving sum fysioterapeutur við góðkenning

Nærri fæst at vita um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a. við at ringja 304500, lokal 5797 til Karin Djurhuus, leiðandi fysioterapeut, lskardj@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 14. november 2007 kl 12.00.**

## Námsfrøðingur til Barnadeildina B5

Á Barnadeildini B5 er eitt fast starv á starvsbrøki 0,5 leyst at søkja til setan 1. januar 2008 ella eftir avtalu.

Arbeitt verður aðru hvørja viku (ólíka) frá kl. 08.00 - 16.00.

Námsfrøðingurin er ein partur av toyminum á Barnadeildini.

Barnadeildin hevur pláss fyri 7 børnum í aldrinum 0 - 14 ár.

Deildin er nýumvæld og hevur eisini fingið Barnambulatorium.

Deildin var eisini pilotdeild til THS (Talgild Heilsu Skipan), sum nú er implementerað.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- stytta um innleggingartíðina hjá børnunum við ymiskum ítrivum

**Vit kunnu bjóða:**
- innleiðslu
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur við nógvum avbjóðingum

**Krøv til umsøkjaran:**
- útbúgving sum námsfrøðingur
- góð samstarvsevni
- sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og initiavtivrík/ur

**Fyrimunur**
- um tú hevur royndir at arbeiða saman við børnum og avvarðandi við ymiskum tørvi

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 304500 til Esther Djurhuus, námsfrøðing, lokal 6005 ella til Tove Thomsen, deildarleiðara, lokal 6055.

**Umsóknarfreistin er 26. november 2007 kl. 12.00**

*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo